

Klokkulyngur og steinamosi
Mynd: Marita Gulklett

Steinamosi, *Parmelia saxatilis*,
- gevur morreyð litbrøgd.

Kattarklógv, *Narthecium ossifragum*,
- gevur ein meira jarðgulan lit enn smæran.

Mjaðarurt, *Filipendula ulmaria*,
- saman við cochenillu gevur mjaðarurt eisini litbrøgd av purpuri.

**Litingin**
Framferðarhátturin við plantuliting var í stuttum hesin: Planturnar vórðu vaskaðar og lagdar í blot í eitt samdøgur. Lyngur skuldi tó klippast í smápetti, áðrenn hann var lagdur í blot. Síðan vórðu planturnar settar útá og kókaðar ein tíma í sama vatni (ein til tríggjar tímar um tað var mosi). Síðan vórðu plantuleivdirnar sílaðar frá og løgurin settur at kólna. Tá vatnið var komið niður á 35 hitastig, varð garnið ella klæðið lagt í pottin og kókað enn ein tíma. Síðan skuldi tað standa í pottinum eitt samdøgur. So skuldi tað skolast fleiri ferðir í køldum vatni, síðan í veikum sápuvatni og so aftur í reinum vatni, áðrenn tað varð tikið upp og turkað.

**Reytt og blátt**
Sum sagt, var ikki náttúrutilfar til sterkar reyðar og bláar litir í Føroyum. Reytt varð litað við innfluttari cochenillu. Framferðarhátturin var nøkulunda tann sami sum við plantuliting – tó skuldi man vera varin við, at klæðini kundu tódna við cochenilluliting.

Tað er onki, ið bendur á at fólk hava litað blátt í Føroyum, fyrr enn indigo kundi innflytast. Litingin kravdi ein serstakan framferðarhátt, sum tey flestu neyvan hava brýggjað seg um, nevniliga við einum lúti av súrgaðum landi. Vit skulu ikki koma nærri inn á framferðarháttin her, eftirsum tað fellur eitt sindur uttanfyri evnið, men prísurin fyri vakra bláa litin var ein heldur ótespiligur landluktur, sum var ringur at vaska heilt úr klæðunum.

*Anker Eli Petersen*